# Spot Festivalurin eygleiðir føroyskar bólkar

**Umboðsmenn fyri Spot Festivalin leita støðugt eftir dygdarbólkum, sum veruliga hava nakað at bjóða. Óvist er, um teir funnu nakran í Kagganum týskvøldið, men teir halda, at allir bólkarnir hava støði til at spæla á Spot**

SHOWCASE

*Rókur Jákupsson Jakobsen*





Týskvøldið var ein sonevnd Showcase í Kagganum. Umboðsmenn fyri navnframa Spot Festivalin vóru staddir í landinum fyri at hyggja nærri upp á nakrar útvaldar føroyskar tónleikabólkar.

Gunnar Madsen, sum er høvuðsfyriskipari av Spot festivalinum og Jan Sneum, sum er produsari hjá DR, eru áhugaðir í føroyskum tónleiki. M. a. kann sigast at í 1999 trein ein ókendur Teitur Lassen á pall á Spot festivalinum, og hetta skuldi vísa seg at verða byrjunarskotið til nakað heilt stórt, sum vit øll kenna til í dag. Sostatt er Spot Festivalurin ein røð av konsertum, sum vísa fram stór talent, og millum áhoyrararnar eru aloftast týdningarmikil fólk frá tónlekavinnuni. Hetta ger tað serliga spennandi at luttaka á Spot Festivalinum hjá ókendum bólkum.

Elin Hentze stóð fyri tiltakinum í Kagganum týskvøldið, og hon greiðir frá, at umboðsmenninir hava sæð brot úr semifinaluni í Prix Føroyum og Atlantic Music Event, og út frá hesum hava teir valt nakrar bólkar, sum teir kundu hugsað sær at hoyrt meiri av. Tá ið avtornaði vóru heili 11 bólkar og einstaklingar bodnir at spæla fyri umboðsmonnunum.




### Eingin garantur

Hóast umboðsmenninir hava ferðast langa leið fyri at hoyra meir til bólkarnar, so er ongin garantur fyri, at eitt føroyskt íkast verður at hoyra og síggja á Spot Festivalinum næsta juni. Umboðsmenninir vilja sum sagt hoyra meiri til bólkarnar, og ikki vita teir enn, um teir fara at bjóða nøkrum bólki at spæla á Spot Festivalinum.

Teir leita alla tíð eftir dygdarbólkum, sum veruliga hava nakað at bjóða, og tað er óvist, um teir hava funnið tað í Kagganum. Tó siga teir báðir í samrøðu við Útvarp Føroya, at allir bólkarnir hava støðið til at spæla á Spot, so vit mugu bara bíða spent.

Tó lata umboðsmenninir sera væl at øllum tiltakinum. Teir eru væl nøgdir við tónleikin, og so eru teir eisini bilsnir av, hvussu lættliga tiltakið spældi av. Teir vilja ikki nevna nakran bólk framum aðrar, men vísa á at støðið var »overraskende højt«.

Í summar vóru trý føroysk umboð á Spot festivalinum. Teitur spældi enn einaferð, og afturat honum spældu Lena og Eivør. Fyriskipararnir greiða frá, at tað helst ikki slepst undan einum (ella fleiri) føroyskum íkasti á Spot á festivalinum komandi summar.

Vit mugu bara bíða í spenningi.

**Bólkar, sum spældu í Kagganum:**
Lama Sea
Týr
GoGo Blues
Paradox
Marius
The Dreams
200
Kári Sverrisson
Deja Vu
All That Rain
Sic

